


*Ensku konslahúsini vórðu keypt til KFUK virksemi og vígd av Jákupi Dahl, prósti, tann 29. juni 1922. Sama dag varð felagið KFUK stovnað, og hevur felagið við sínum fjøltáttaða virksemi hildið til í KFUK síðan*

# Áttati ár í KFUK

**Tað eru í dag liðin 80 ár, síðan KFUK í Havn varð stovnað. Sama dag vórðu húsini, KFUK í dag húsast í, vígd**

FØÐINGARDAGUR
*Edvard Joensen*

KFUK fyllir í dag 80 ár. Tann 29. juni 1922 vórðu bretsku konslahúsini, sum keypt vórðu til KFUK arbeiðið í Havn, vígd, og sama dag varð felagið KFUK í Tórshavn stovnað. Táverandi drívkraftin, Frk. Hansen, stóð persónliga sum keypari, og familja hennara í Vági veðhelt.

KFUK arbeiðið hevði í eini tvey ár frammanundan verið í Tinganesi, greiðir Jona Henriksen, fyrrverandi KFUK, skrivari, frá.

Men í Tinganesi var vorðið ov trongligt, eins og tað var heldur dýrt at leiga høli har, úti, og tí varð farið undir at leita eftir hóskandi hølum til arbeiðið, sum Frk. Hansen, ið nevnd er í grein aðrastaðni í blaðnum, stóð fyri. Avtala varð gjørd við enska konsulin um keyp av konslahúsunum, sum enn dagin í dag stutt og greitt eru kend sum KFUK.

Konslahúsini vóru eitt sindur øðrvísi vorðin, enn tey eru í dag. 15 ferðir 30 alin við úthúsum og jarðarstykkinum, sum í dag er kent sum KFUK trøðin. Kostnaðurin var 35.000 krónur.

Neyðugt var at umbyggja húsini fyri at fáa tey egnað til tað brúk, tey vóru ætlað til. Í hesum sambandi varð tikið eitt lán upp á 52.000,- krónur í Føroya Sparikassa, sum sama Frk. Hansen stóð fyri, og familja hennara í Vági veðhelt fyri.

– Neyðugt var, at hon sum privatpersónur stóð fyri allari forrætningini, tí einki felag var, tá húsini vóðru keypt. Og tað var rættiliga stórsinnað av familju hennara í Vági at veðhalda fyri eini so ótryggari ætlan, heldur Jona Henriksen.

Seinnapartin tann 29. juni 1922 varð húsið vígt av Jákupi Dahl, prósti. Um kvøldið var veitsla í húsinum, og har varð gjørt av at stovna felagið KFUK, sum síðan yvirtók ognir og skyldur, sum Frk. Hansen hevði átikið sær persónliga. Á stovnandi fundinum vórðu 45 limir teknaðir í nýggja felagið.

## Gerandisdagurin

Men lán skal gjaldast aftur, og tað noyddust tær so undir í KFUK. Tað var, sum so mangan hjá slíkum feløgum, fingið inn aftur við árliga basarinum, gávum og tí, sum fekst inn fyri leigu.

Frá fyrsta degi, sum enn er í dag, hava ungar gentur leigað á loftinum í KFUK. Tann inntøkan fór so upp í ta puljuna, sum gjalda skuldi íløguna við Varðagøtu aftur.

Men húsini vórðu keypt at hýsa tí virksemi, sum KFUK rak. Og tað er heldur ikki broytt stórvegis hesi áttati árini, sum farin eru, síðan flutt varð í gomlu bretsku konslahúsini, hóast onkur deild tó er komin afturat í bæði yngra og eldra endanum.

Byrjað var við Várgleði, sum eru smágentur, ið koma saman í KFUK. Næsti bólkur var Ungmannadeildin, sum var fyri gentur, ið vóru 13 ár og eldri, meðan tær vaksnu fylktust í Aðaldeildini, greiðir Jona Henriksen frá.

Frk. Hansen hevði ymisk hjartamál, og var eitt teirra skótaarbeiðið.

KFUK skótarnir vórðu settir á stovn tann 9. mai 1928, og fýra ár seinni komu títtlingarnir upp í bólkin. Títtlingarnir hava fyri stuttum hildið 70 ára hátíðarhald.

Einaferð í seksti árunum byrjaðu eldri fólk at hittast í KFUK, og verður eldrasamkoman sera væl vitjað í dag, sigur Jona. Og fyri umleið trimum árum síðan, varð farið enn longri niður í aldursbólki enn Títtlingarnir, tá Spírarnir komu undan. Tað eru gentur í fimm til sjey ára aldri.

KFUK er felagskapur, sum stendur kirkjuni nær. Aðalfundarsamtykt er, sum sigur, greiðir Jona Henriksen frá, at um so skuldi verið, at KFUK helt uppat, skulu ongir felagsins latast kirkjuni í varðveitslu, til ein felagsskapur við sama endamáli sum KFUK, verður stovnaður, ið so kann yvirtaka ognirnar.

## Missiónsarbeiði

KFUK er stovnað við tí fyri eyga at reka sosialt arbeiðið á trúargrund her heima á landi. So sum skótarørslu og kristiligar fundir, eins og limafundir regluliga hava verið hildnir.

Men eitt av mongu hjartamálunum hjá Frk. Hansen, sum var fyrsta drívkraftin i felagnum, var Ytri Missiónsarbeiðið.

Hon stovnaði ein sonevndan Ytri Missiónsring, veit Jona Henriksen at siga frá. Hetta arbeiðið varð sera væl stuðlað av føroyingum.

Frá mammu síni, sum hevði fingið tað at vita beinleiðis frá Frk. Hansen, veit Jona at siga, at tað komu nógvir føroyskir sjómenn í KFUK við peningagávum til Ytri Missiónina.

Serliga undir seinna heimsbardaga, tá Danmark var avskorið og ikki fekk latið pening til missiónsstøðirnar úti í heimi, komu føroysku gávurnar væl við.



*Lousia Niclasen, felagsskrivari hjá KFUM og KFUK*

Sagt varð frá eini støð, sum skuldi latast aftur, men kortini helt fram, tí føroyingar lótu so stórar pengagávur, at tað bar allan raksturin, greiðir Jona frá.

## Nútíðin

KFUK er í dag ein býarmynd. Húsini eru sjónsk og eingin ivast í, hvør har heldur til. Ja, so kend eru tey, at eisini teir, sum eru á floti í Nólsoyarfirði, av og á brúka tey sum ýti.

Hóast tey vóru umbygd, tá flut varð inn, er virksemið vaksið so mikið við tíðini, at neyðugt hevur verið við útbygging, sum gjørd varð í 1972, tá salurin varð vaksin við einum triðingi.

Í kjallaranum á hesum tilbygninginum húsast eisini skótarnir í einum skótasali, køki o.ø.

Skrivari í KFUK í dag er Louisa Niclasen úr Hesti, sum samstundis er skrivari hjá KFUM í Havn.

NÚ KFUK í Tórshavn í dag fyllir 80 ár, eru umleið 100 limir í felagnum.



Ein av fyrstu skótunum, Eva Thomsen:

# Enn limur í KFUK



*Eva Thomsen er 89 ára gomul, og var hon ein av teimum fyrstu KFUK skótunum. Hon er framvegis limur í 4. grein hjá KFUK*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eva Thomsen er 89 ára gomul. Hon var við í Várgleði úti í Tinganesi og var við tann dagin tá KFUK varð sett á stovn fyri 80 árum síðani. Eva er framvegis limur í 4. grein hjá KFUK, og minnist hon framvegis ta góðu tíðina sum skóti heilt klárt**

SKÓTALÍV
*Ingrid Bjarnastein*

Á einum kamarið á ellisheiminum í Havn situr 89 ára gamla Eva Thomsen. Og í KFUK høpi er Eva Thomsen ikki ein og hvør. Nei, hon var ein av teimum fyrstu, sum var við tá KFUK varð stovnað, og er hon framvegis limur í KFUK, hóast sín høga aldur.

– Eg hevði tríggjar systrar. Tvær eldri og eina yngri, og tær eldru vóru við í Várgleði úti í Tinganesi. Har lærdu vit mangt og hvat hondarbeiði, og vóru tað tær størru genturnar, sum lærdu tær smáu. Tá var eg bert 9 ára gomul, fortelur Eva.

– Tann dagin KFUK byrjaði minnist eg væl. Tað var ein deiligan sólskins sunnudag. Vit stóðu allar hvítklæddar frá portrinum niðan framvið vegnum. Nógv fólk var komið saman hendan dagin.

Eva minnist, hvussu hon og hinar genturnar spældu úti á grasvøllinum uttan fyri KFUK. Inni í sjálvum húsinum var sungið og ymiskur annar aktivitetur.

– Eg haldi ikki, at eg eingongd kom inn í sjálvt húsið tann dagin, heldur Eva skemtandi fyri.

## Frítíð og náttúra

Tíðin gekk, og Eva helt fram við Várgleði uppi í KFUK, men nøkur ár seinni, var hon nóg gomul til at vera skóti. Tað var tann 9. mei í 1928.

Eva var í fyrstu skótapatrúljuni hjá KFUK – 2. patrúlju av skótum.

– Hetta var ógvuliga spennandi, greiðir Eva frá. – Vit skuldu vera í uniformi. Grøna troyggju, slips, hvítan snór, floytu, myrkabláan niðurdeil og brúnar skógvar og sokkar. Harumframt høvdu vit eisini eitt leðurbelti, har tað bar til at bera ein knív. Eisini var ein filthattur til at hava á høvdinum.

Í skótalívinum var tað tað andaliga, sum hevði fyrsta prioritet. Ein skuldi uppføra seg rætt, og við skótunum var Eva eisini ofta í kirkju.

– Ein var altíð vælkomin í KFUK, og hetta gjørdi tað ógvuliga stuttligt, sigur Eva Thomsen.

Fyri Evu hevur náttúran og frítíðin havt nógv at siga. Hon heldur fyri, at hevði tað ikki verið fyri KFUK skótunum, so hevði hon ikki verið á øllum teimum fjallatindunum, sum hon í dag hevur staðið á.

– Tjaldtúrar og legur havi eg glett meg yvir, men at ganga í náttúruni var nakað heilt serligt. Serliga minnist eg tveir túrar. Annar var á Slættaratind og hin var út í Nípuna í Norðadali.

Eva fortelur síðani, hvussu hon og hinar genturnar noyddust upp klokkan 3 á morgni fyri at síðani fara við bátinum klokkan 4 til Eiðis. Á Eiði vóru tær klokkan 7, og tá gekk leiðin niðan á Slættaratind.

– Sjálv hevði eg verið so ring av kikhosta, og eg kom ongantíð rættiliga fyri meg aftur sum barn, men niðan á Slættaratind slapp eg. Men ikki í toyskóm. Eg skuldi í kálvskinsskógvar. Pápi segði við meg, at eg skuldi í kálvsskinsskógvar, føroyskar sokkar og skóleistar. Men eg skuldi ikki í tað fyrr enn kom til Eiðis. Og teir svørtu kálvsskinskógvarnir við reyðum tveingjum høvdu tað við sær, at eg var tann einasta, sum kom turrføtt aftur til Havnar.

Summarsunnudagarnar tá veðrið var gott, vóru fraktbátar ella aðrir bátar, sum jú ikki arbeiddu sunnudag, leigaðir, og síðani var siglt til eina av oyggjunum, har farið var upp á eitt fjall.

– Men hjá skótunum lærdu vit mangt og hvat. Binda knútar, spleisa, skótalógina og skótalyfti og nógv annað.

Eva var við í KFUK til hon fór niður til Danmarkar í 1937, og niðri í Danmark var hon eisini skóti.

– Og nú fyllir KFUK 80 ár. Eg eri framvegis limur og eg haldi, at tað er ógvuliga stuttligt, at skótarnir hava eina grein fyri teir eldru limirnar, 4. grein. Men um eg fari til hátíðarhaldið, veit eg ikki rættiliga. Eg vil ógvuliga gjarna, men tað er avmarkað, hvussu langt kreftirnar strekkja, sigur 89 ára gamla Eva Thomsen at enda.